# Kunngerðablaðið A

2010 Hefti 18

ISSN 0907-905X


Nr. 82 30. juni 2010

## Kunngerð um broyting í kunngerð um brygging og útflýggjan av sterkum øli

### § 1

Í kunngerð nr. 153 frá 28. oktober 1992 um brygging og útflýggjan av sterkum øli verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 3 verður í staðin fyri „Rúsdrekkasølu Landsins“ sett: „Loyvisnevndin“.

2) § 5. verður orðað soleiðis:

„**§ 5.** Útflýggingarstøðini kunnu hava opið mánadag til fríggjadag millum kl. 10.00 og kl. 18.00, tó ein av døgunum til kl. 19.00. Leygardag kunnu útflýggingarstøðini hava opið millum kl. 10.00 og kl. 16.00.“

### § 2

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er lýst.

Vinnumálaráðið, 30. juni 2010

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

Nr. 83 30. juni 2010

# Kunngerð
# um
# at leggja umsitingina av matvørulóggávuni til Heilsufrøðiligu starvsstovuna og um kæru

Við heimild í § 45, stk. 1, 2. pkt., og § 56, stk. 1, í løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2010 um matvørur v.m., verður ásett:

**§ 1.** Heilsufrøðiliga starvsstovan umsitur eftirlit, umsjón, kanningar og kunningarvirksemi v.m., sum hevur samband við matvørulógarøkið.

**§ 2.** Avgerðir, sum Heilsufrøðiliga starvsstovan hevur tikið eftir løgtingslóg nr. 58 frá 26. mai 2010 um matvørur v.m. ella reglum, givnar við heimild í lógini, kunnu kærast til Vinnukærunevndina innan fýra vikur eftir, at móttakarin hevur fingið boð um avgerðina. Avgerðir, sum Vinnukærunevndin hevur tikið, kunnu ikki kærast til hægri fyrisitingarligan myndugleika.

**§ 3.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Vinnumálaráðið, 30. juni 2010

**Johan Dahl (sign.)**
landsstýrismaður

/ Arne Poulsen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705